Landssjúkrahúsið

# Sjúkraflutningstænasta í Sandoy

## Útboð
## 2017/18

J.C. Svabosgøta 41-49 • 100 Tórshavn • Tel. (298) 304500 • fax 314253 • www.ls.fo • ls@ls.fo

Landssjúkrahúsið (LS) bjóðar við hesum út Sjúkraflutningstænastuna í Sandoy. Tænastan er at hava vakt 24 tímar um døgnið alt árið og at koyra teir túrar, sum vaktsentralurin hjá Sjúkraflutningstænastuni á Landssjúkrahúsinum umbiður.

Landssjúkrahúsið/Bráðdepilin/Sjúkraflutningstænastan hevur yvirskipaða rættin til sjúkraflutningstænastuna í hesum útboði. Tað er liðlæknin fyri Sjúkraflutningstænastuna á LS, ið hevur ta fakligu ábyrgdina.

Niðanfyri verður greitt frá ynsktu tænastuni, krøv til veitara og ábyrgdarbýtinum millum LS og veitara. Síðani verður greitt frá, hvussu tilboðsgeving og tillutan fer fram.

Upplýstu tølini í tilfarinum eru fyri 2016 og verða mett nøktandi sum grundarlag í útboðnum.

**1. Upplýsing um innlating**

Freistin at lata inn tilboð er 5. januar 2018 kl. 12:00. Tilboðini skulu latast til Landssjúkrahúsið, Sjúkraflutningstænastuna, att. Jákup Nolsøe. Tilboðini verða latin upp alment 5. januar 2018 kl 12:00 í Gestaborðstovuni á Landssjúkrahúsinum. Til ber at senda tilfarið elektroniskt til Jákup Nolsøe lsjakno@ls.fo við somu freist sum omanfyri.

Møguligir spurningar til tilfarið skulu setast skrivliga og skulu vera LS, Jákup Nolsøe lsjakno@ls.fo , í hendi innan 8. desember 2017 kl 12. Spurningar og svar verða kunngjørd á keypsportalinum www.keypsportal.fo í seinasta lagi hin 12.desember 2017.

Tillutan verður kunngjørd alment umvegis keypsportalin, tá avtala er undirskrivað við veitara.

LS tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði. Sí krøv til tænastuna og umbidnar útgreiningar.

**2. Uppgávulýsing/tænastan**

Talan er um at koyra sjúkraflutningar frá Sandoynni og til Landssjúkrahúsið umframt flutningar frá LS til Sandoy. Vaktsentralurin hjá Sjúkraflutningstænastuni umbiður allar flutningar eftir sama leisti, sum tilsvarandi flutningar kring landið.

Tá sjúkraflutningur verður umbiðin verður upplýst ein koda, ið greitt tilskilar, hvussu stóran skund sjúkraflutningurin hevur. Koda 1 og koda 2 flutningur skulu avgreiðast beinanvegin uttan drál.

Vaktsentralurin kunnar eisini sjúkraflutningstænastuna í Sandoy um, hvørt koyrast skal til LS, ella um sjúkrabilur frá LS stendur klárur at móttaka sjúkling á Gomlurætt.

Árligt túratal liggur um 180 túrar, har nógv teir flestu eru frá Sandoy til LS. Bert einstakir túrar eru frá LS til Sandoy.

Flutningarnir kunnu býtast:

| | |
|---|---|
| Koda 1 flutningur | 10-12% |
| Koda 2 flutningur | 26-28% |
| Koda 3 flutningur | uml. 60% |

**3. Veitarin**
Veitarin skal tryggja, at vaktarskipan er í Sandoynni 24 tímar um døgnið alt árið. Hetta merkir, at veitarin umsitur starvsfólk og vaktarskipan/-ætlan, ið eru knýtt at Sjúkraflutningstænastuni í Sandoy.

Starvsfólkaumsiting ber eisini í sær, at veitarin tekur sær av og hevur ábyrgdina fyri løn, feriuløn, eftirløn og trygging vegna egnu starvsfólkini.

Liðlæknin og leiðarin fyri Sjúkraflutningstænastuna á LS góðkenna øll starvsfólk, ið skulu knýtast til tænastuna. Í samband við starvsfólkagóðkenning og krøv til starvsfólk í Sjúkraflutningstænastu í Føroyum verður víst til *kunngerð um skipan av sjúkraflutningstænastuni við heimild í §12, stk.2, í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið.*

Leggjast skal afturat, at ófrávíkiligt krav er, at starvsfólk í sjúkraflutningstænastuni hava reina revsiváttan og eru í minsta lagi 21 ár.

LS leggur stóran dent á, at veitarin virðismetir hesa týdningarmiklu tænastu fyri Sandoy, og at veitarin samstarvar væl við kommunulæknan í Sandoy.

Í dag eru 4-5 fólk knýtt at tænastuni. Leiðarin í Sandoy vísir til sjúkraflutningsleiðaran á LS.

**4. Útgerð**
LS/Sjúkraflutningstænastan keypir og eigur sjúkrabilin og alla tilhoyrandi útgerð. LS rindar fyri alt viðlíkahald, umvælingar, olju, og brennievni til sjúkrabilin.

Um/tá sjúkrabilur skal til umvælingar ella eftirlit, skal bilurin til LS í býti fyri annan bil.

Harumframt veitir og rindar LS telefonir (samskiftisútgerð) saman við sjúkrabilinum.

**5. Upplæring, skeið v.m.**
LS stendur fyri at upplæra øll starvsfólk, ið eru knýtt at skipanini. LS leggur stóran dent á, at eins høg og trygg tænasta verður veitt um alt landið.

**Nýggj starvsfólk** skulu fyrst gjøgnum eina grundútbúgving, ið kann væntast at taka 6 vikur. Grundútbúgvingin fer fram á LS ella á sjúkraflutningsstøðum, sum LS vísir á. LS rindar løn til starvsfólk, meðan tey eru undir grundútbúgving.

Í samband við **avtalubyrjan** vil LS tryggja, at starvsfólkini, ið veitarin hevur knýtt at tænastuni, lúka øll krøv til sjúkraflutningstænastu, sí petti 3.

Í **avtalutíðarskeiðnum** kallar liðlæknin við fakligu ábyrgdini starvsfólkini inn á LS at luttaka á skeiðum og at gera venjingar. Til hesi førleikakravdu skeiðini rindar veitarin løn til starvsfólkini. Eisini kann liðlæknin leypandi fremja skeið, venjingar og góðskueftirlit á Sandoynni við manningini.

**Harumframt** verður kravt, at starvsfólkini í Sandoynni taka í minsta lagi 15 vaktir á LS árliga fyri at dagføra sínar førleikar. Tá starvsfólkini taka vaktir á LS, rindar LS løn til starvsfólkini samsvarandi galdandi sáttmála á økinum.

LS veitir og rindar búnar til starvsfólkini, ið eru knýtt at sjúkraflutningstænastuni.

**5. Framferð og tillutan**

Innkomin tilboð verða latin upp alment sí petti 1. Tá upplating fer fram, verður upplýst alment navnið á tilboðgevara.

Tilboðini skulu innihalda hesar upplýsingar:
Árlig upphædd fyri tænastuna
Upplýsingar um starvsfólkasamanseting, herundir navn, aldur, royndir v.m.

Framferðarhátturin er soleiðis, at fyrst verður kannað eftir, um veitari og starvsfólkini lúka krøvini í lóggávu og útboðstilfarinum.

Tillutað verður síðani eftir prísi millum teir tilboðsgevarar, sum lúka ásettu krøvini. Herundir almennu krøvini til veitarar til landið.
http://www.logir.fo/Logtingslog/98-fra-20-06-1995-um-at-avmarka-moguleikar-hja-skuldarum-at-taka-lut-i-utbjodingum

**5.1 Avtalutíðarskeið**

Avtalutíðarskeiðið er 2 ár við optión upp á 2 x 1 ár. Avtalan kann í serligum førum sigast upp í avtalutíðarskeiðnum við 6 mðr. freist. Um álvarslig brot verða framd í avtalutíðarskeiðnum, kann avtalan sigast upp uttan ávaring.

3 mðr. undan avtalutíðarskeiðið endar, verður nærri útgreinað, um partarnar ynskja at brúka optiónina í avtaluni.

Miðað verður eftir, at avtalan byrjar 1. mars 2018 ella skjótast til ber eftir tað.